## DAGSINS MEINING

# Børn eiga javnan rætt

Hóast uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at avtaka revsirættin hjá foreldrum hevur fingið misjavna móttøku á tingi, er hetta eitt sera gott uppskot. Tað eru nú mong ár síðan, at likamlig revsing í skúlanum varð forboðin. Lærarar hava ikki loyvi at sláa børn og tilkomin fólk hava ikki loyvi at sláa onnur vaksin. Hví skal tað so vera loyvt foreldrum at nýta likamliga revsing mótvegis børnum? Svarið er givið frammanundan. Hetta eigur ikki at vera loyvt framyvir.

Málið um revsirættin er eitt sera álvarsamt mál. Tað snýr ikki bara um, hvørt tað skal verða loyvt at geva ein brest í afturpartin so av og til. Hetta snýr seg um, at allir samfelagsins limir eiga javnan rætt, hetta snýr seg um grundleggjandi humanistisk virði og hetta snýr seg um familjuna. Eisini snýr hetta seg um at hava einsháttaðar rættarreglur í Norðurlondum.

Tað er illa hugsandi, at ikki øll í hesum samfelagnum eru samd um, at øllum eiga at verða tryggjað somu og jøvnu rættindi. Sostatt skuldi málið verið sera einfalt, og allir flokkar áttu at tikið undir við uppskoti Javnaðarflokksins uttan víðari. Men hetta mál snýr seg sjálvsagt eisini um onnur viðurskifti eitt nú um gamla siðvenju, hóast átrúnaðarlig viðurskifti sambært sendingini "Sostatt" ikki tykjast at vera tann stóra forðingin. Tøkk til útvarpsfólkini fyri eina viðkomandi og góða sending.

Hetta mál snýr seg eisini um familjuna, um hvussu barnafamiljan hevur tað í dagsins samfelag. Tað er tískil ikki nóg mikið, at uppskotið um at avtaka revsirættin verður samtykt. Hetta mál má fylgjast upp við familjupolitiskum tiltøkum, so tað verður betri at vera barn og betri at vera foreldur í Føroyum. Hóast tímilig framstig er tað trupult at vera foreldur ikki minst fyri einsamallar møður. Arbeiðsdagurin er langur og stressaður, bústaður dýrur og trupult er at finna nøktandi barnaansing hjá útiarbeiðandi foreldrum. Talan er sostatt um eina heild, ið eigur at fáa eina heildarloysn, so vit kunnu bjóða uppvaksandi ættarliðinum tey bestu lívskor.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Einki lump og lirk á Vaglinum

**– men heldur eitt »one man show« av Jógvan Arge**

**Sjúrður Olsen**
*Býráðslimur, Tórshavn*



Ein fær varhugan av, at býráðsfundirnir í Havn nú vera varpaðir út av kendum útvarpmanni eins og ein fótboltdystur.

Enn einaferð er Jógvan Arge í bløðunum og kærir sína neyð sum býráðslimur. Evnið er tað sama: Eg sleppi ikki at at ráða, tí eru hini ódemokratisk. Hesuferð fer Jógvan so langt sum at siga, at Sosialurin, ið var við á býráðsfundinum, ikki dugur at siga nóg væl frá fundinum. Sjálvsagt sigur hann slíkt, tí at Sosialurin ikki framhevjar Jógvan Arge sum tað stóra »orakli«.

Orðalagið hjá Jógvan Arge er tað sama: Meirilutin sýnir vanvirðing, trumfar mál ígjøgnum og rekur skýmakrókspolitikk, har alt skal lumpast og lirkast.

Tað tykir mær eitt sindur løgið, at maðurin sum situr í minnuluta í býráðnum skal rópa so hart um býráðsmál, ímeðan einki hoyrist til sama mann frá løgtinginum, har hann situr í samgongu. Kann tað vera tí, at lættari er at finnast at, heldur enn at royna at gera okkurt sjálvur??

Málið, ið Jógvan Arge metir er lumpað og lirkað ígjøgnum á síðsta býráðsfundi er í veruleikanum sera einkult. Arge-maðurin vildi partú hava býráðið at samtykkja eina samtykt, ið logu var samtykt. Honum í minnilutanum var gjørt kunnugt, at um eingin broyting skuldi gerast til samtyktuna, ið var løgd fram á býráðsborð, so var nokk at framleggja hana, tí avgerðin varð tikin í teirri nevndini, sum málið hoyrdi undir.

Einki vildi tú hava nøkur mál staðfest Jógvan, tú kravdi at fáa samtykt og játtað nøkur mál, ið longu vóru samtykt og játtað. Sosialurin skrivar, sum rætt er, at býráðsformaðurin bað teg fara av fundinum, um tú ikki vísti fundarsið. Kanska er tað fráboðanim um at vera vístur av fundinum, tú meinar við, tá tú skrivar, at býráðsformaðurin gav tær skomm og skitin orð. Tað at býráðslimur missur tamarhaldið á sær sjálvum, so hann ikki kann vera á býráðsfundi, kann ikki vera býráðsformansins skomm.

# Kommunan og Televarpið

**Jógvan Arge**
*Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin*



Tað kom tíverri ikki nógv burtur úr at skjóta upp fyri Tórshavnar Býráð at fáa Rás Tórshavn at senda aftur. Tað gav heldur ikki afturljóð hjá teimum, sum stýra býnum, at 3157 borgarar skrivaðu undir eina áheitan um hetta sama.

Meirilutin í býráðnum við Jan Christiansen og Heðini Mortensen á odda vildi ikki ganga á møti ynskinum hjá einum stórum parti av kommununnar borgarum, um at taka upp aftur eina ta bestu kommunalu tænastuna, sum Tórshavnar Kommuna hevur havt.

So mikið vita vit í dag. Men kommunan og Televarpið áttu ikki at sloppið at doyggja í syndini.

Uttan at Tórshavnar Býráð hevur havt høvi til at taka støðu til tað, sum kom burtur úr samráðingum millum kommununa og Televarpið, undirskrivaðu og effektueraðu hesir báðir partarnir ein sáttmála, sum fyri kommununa og borgararnar er eitt hol í jørðini - fyri ikki at siga hol í høvdið.

Faktum er, at kommunan fyri eina lítla millión hevur givið Televarpinum ein marknaðarpart upp á í minsta lagi 6000 kundar. Men kommunan tryggjaði sær ikki, at hennara borgarar fingu eitt tilboð, sum bara líktist Rás Tórshavn afturfyri tað, sum latið varð. Hon tryggjaði sær heldur ikki so frægt sum eina tillagingarskipan.

Gangi út frá, at fleiri enn vit fýra í minnilutanum og eisini fleiri enn tey 3157, sum ómakaðu sær at skriva undir, hava eina sterka kenslu av, at her er farið so jánkasliga fram, at kommunan og Televarpið mugu koma út við onkrum, sum bøtir um skaðan.

Tí verður heitt á Andrass Róin, sum hevði so frálíkt úrslit við Føroya Tele í fjør, um at seta seg kring borðið saman við Jan Christiansen og Tróndi Djurhuus við tí endamáli at greina, hvat er gjørt skeivt, og finna út av, hvussu borgararnir í Havn fáa eitt tilboð, sum ikki ber bráð av útnýting.

Tí útnýting og vánalig røkt av borgarans áhugamálum var tað at sløkkja ta ókeypis Rás Tórshavn eftir einum degi og í sama andadrátti knalla eitt tilboð á borðið, sum kostar upp í 8000 krónur pr. húski bara í hesum árinum.

Tað er ikki skomm at taka í egnan barm, men tað er vánaligur politikkur og vánalig marknaðarføring at privatisera sínar borgarar og kundar um rygg.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Aldur og leiðsla landsins

**Abraham Mikladal**



Hugdi við áhuga eftir sjónvarpssendingini Fokus týskvøldið, har Finnbogi Ísakson og Jógvan Sundstein luttóku. Garvaðir politikarar, tað er vist, men var alt eftirfarandi, sum teir bóru fram?

Serliga Finnbogi legði áherðslu á, at tingfólk og serliga landsstýrisfólk okkara vóru ov ung og óroynd. Hann helt, at eitt minimumskrav fyri at sleppa í landsstýrið skuldi verða 4 ár í tinginum fyrst. Báðir vístu á tað skipaða og sakliga arbeiðslagið, sum ráddi meginpartin av tíðini, meðan teir vóru virknir og ráddu fyri borgum. Til samanberingar var í dag nógv kegl og persónsprofilering.

Tað er rætt, at nógv kegl og nógvar illstøður millum flokkar og innan flokka kemur fram í fjølmiðlunum, og at teir mest ágangandi politikararnir gera sær dælt av teimum góðu møguleikunum í nútíðar samfelagið bjóðar á samskiftisøkinum, til gagns fyri seg sjálvar og ofta til skaða fyri sakina og heildina. Hetta kann verða rættuliga ørkymlandi og troyttandi fyri borgaran.

Men tá tað er sagt, so er vert at leggja sær í geyma, hvat ið er komið av skafti undir leiðsluni av teimum garvaðu politikarunum, í mun til tey ungu og sokallaðu óroyndu í dag.

Jú, teir garvaðu formáddu at koyra samfelagið av knóranum og viðvirka til størstu "tvangsflyting" av føroyingum av landinum nakrantíð.

Til samanberingar hava tey nýggju og "óroyndu" bygt samfelagið upp við eini risaferð, sum er heilt ókend í øllum heiminum. Føroyar hava havt ein BTÚ-vøkstur, ið er langt omanfyri tað, ið búskaparfrøðingar kenna til nakra aðrastaðni.

Samstundis er samfelagið konsoliderað og gjørt leysari av stuðuli uttaneftir.

At stórt útskifti var aftan á kreppuna var heilt natúrligt. Fólk høvdu fingið eyguni upp fyri, hvat gerontokratii, teir garvaðu "professionellu" politikarnir høvdu at bjóða teimum. Teir allar flestu eru burtur í dag, men tó so, onkur hevur ikki funnið hurðina enn.



# Nýggj hølir til Tekniska skúla og Handilsskúlan í Tórshavn

**SKÚLABYGGING**
*Vinnuhúsið*

Undir samgongusamráðingunum framgekk tað í bløðunum, at ein skúladepil í Marknagili til frama fyri Tekniska skúla og Handilsskúlan skuldi raðfestast fremst. Nú hevur verið frammi, at ein studentaskúli skal byggast fyrst

Vinnan stendur spyrjandi yvirfyri hesum. Tekniski skúli í Havn búleikast í barakkum, og Handilsskúlin manglar hølir.

Tekniski skúli og Handilsskúlin hava í felag gjørt eina verkætlan, sum kemur at tyngja fíggjarlógina við 4 mió. kr eyka í rakstrarútreiðslum um árið, tá ið Handilsskúlin er liðugt útgoldin í 2008. Verkætlanin er grundað á samgonguskjalið og tí skilir vinnan ikki, at henda verkætlanin er skotin 10-12 ár fram í tíðina.

Í verkætlanini, sum er gjørd, er hædd tikin fyri, at ein studentaskúli kann byggast afturat.

Tekniski skúli í Tórshavn hevur í fleiri førum fingið at vita, at skúli verður bygdur um 10-12 ár uttan at hetta er vorðið veruleiki. Vinnan metir, at nú er tíðin komin, at Tekniski skúli í Havn fær sømuligar umstøður at virka undir soleiðis, at skúlin kann mennast og verða ein hollur grundarsteinur undir tí føroysku handverksvinnuni.

Fyri vinnuna hevur tað stóran týdning, at vinnuskúlarnir verða raðfestir ovarliga, og vinnan harvið fær nøktað sín útbúgvingartørv.

# Kórstevnan 2 0 0 3 verður í Havn 15. - 17. mai



*Havnarkórið*

**KÓRSTEVNA**
*Tíðindaskriv*

Føroysku kórstevnurnar, sum í meira enn tríati ár vóru gleðiligar samkomur hjá kórsangarum úr øllum landinum, hava vegna vantandi undirtøku verið minni regluligar í seinastum. Í fjør og í fyrra ári vóru ongar kórstevnur, og árini beint frammanundan var undirtøkan heldur ikki so góð sum fyrru árini.

Orsøkirnar kunnu vera fleiri, t.d. hava kór nú meira enn fyrr egnar sínámillum verkætlanir; men ein høvuðsbági er uttan iva tað, at fólk hava ikki arbeiðsfrí fríggjadagin í Kristi himmalsferðar vikuskiftunum, har kórstevnurnar aloftast hava verið. Eisini er tað ofta tá farið at sumra so mikið, at fólk ikki so fegin vilja halda seg innandura. Nú hevur Kórsamband Føroya tí í samráð við kór í Havn avrátt, at kórstevnan í ár verður hildin í dýrabiðidagsvikuskiftinum, t.e. 15. - 17. mai.

Stevnuhaldið skal fara fram á Eysturskúlanum, sum er serliga vælegnaður til slík stór tónleikatiltøk; men sum skilst er ætlanin, at tað eisini á øðrum støðum skal merkjast, at kórstevna er í býnum.

Høvuðskórleiðari verður kendi danski tónleikarin Mogens Dahl, sum flestallir føroyskir kórleiðarar og kórsangarar í Havn kenna væl frá einari røð av dirigentskeiðum, sum hann hevur hildið fyri kórsambandið hesi bæði seinastu árini.

Á konsert leygardagin 17. mai fáa fólk høvi at hoyra, hvat ið verður komið burtur úr felagsvenjingini, sum er aðalendamálið við hesum kórstevnuhaldi. Men harumframt verður eisini høvi hjá limakórini at framføra egna sangskrá fyri hinum sangarunum og fyri almenninginum.

Nærri um kórstevnuna verður at frætta bæði frá kórsambandinum og frá kórunum, sum hava átikið sær at skipa fyri tí praktiska.

# Á Vaglinum í 1941



Í greinini hjá Viljormi Tórsheim í blaðnum í gjár um Føroya Ríðingarfelag 60 ár, var ein lítil villa í myndatekstinum til myndina á Vaglinum í 1941. Maðurin við flaggstongini er Vilhelm Tórsheim, drongurin nærmast við hann er Andreas Arge Gregoriussen (Diaba hjá Liffu), við hansara lið er tað trygvi Sondum. Maðurin við yvirfrakka og stórum hatti er Hans andreas Djurhuus, og millum Hans Andreas og Trygva sæst maður við keppi, eisini kallaður kolli á høvdinum, tað er Poul Petersen, fyrrverandi løgtingsmaðurin úr Funningi.